| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 29. mars 2012 |
| Býráðsfundur nr. | 04/2012 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2012 tann 29. mars kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. mars 2012 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus S. Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 08/2012.**

**Víðkan av aliøki hjá P/F Bakkafrost á Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá P/F Bakkafrost, dagfest 12.mars 2012 um víðkan av øki til aling á Fuglafirði. Hetta mál hevur áður verið fyri á býráðsfundi tann 28. september 2011, sum eftir tilmæli frá havnanevndini ikki kundi ganga við til eina so umfatandi víðkan, ið talan varð um sambært hoyringsskrivi frá Heilsufrøðiligu starvsstovu, dagfest 24. august.2011.

Men um ein umsókn um eina minni víðkan av aliøkinum fram við landi, vildu havnamynduleikarnir viðgerða hesa.

Sum víðari viðgerð av hesum máli hevur Fuglafjarðar kommuna móttikið skriv frá Bakafrost, sum nevnt dagfest 12. Mars há., har skotið verður upp, at aliøkið verður minkað soleiðis, at tann uttari parturin verður fluttur umleið 155 m nærri landi, og samlaða øki nú verður umleið 167.000 m2 í mun til o.u. 180.000 m2.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini 23. mars 2012.

Nevndin heldur, at aliøkið kann verða víðkað soleiðis, at tann innasti parturin, sum er innanfyri 30 m kurvina, ikki verður við í víðkanini. Hetta svarar til umleið 9.000 m2.

Samlaða víddin á økinum verður tá umleið 158.000 m2 móti í dag umleið 84.000 m2.

Ein meiriluti í nevndini Dánjal Vang og Kristina Toftegaard Larsen mæla tí býráðnum til, at aliøkið kann verða víðkað, soleiðis at hetta í mesta lagi verður sambært viðløgdu tekning, og at økið í samráð og eftir ávísing frá havnamynduleikunum verður tíðiliga avmerkt við blunkljósum við hóskandi fráleika.

Minnilutin Magnus Midjord tekur ikki undir við málinum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (7-2). Ímóti atkvøddu Jann Toftegaard og Magnus Midjord.

**Mál nr. 09/2012.**

**Viðvíkjandi leigugjøldum hjá feløgum fyri Ítróttarhøllina á Kambsdali.**

Fuglafjarðar kommuna hevur síðan avgerð í mentamálanevndini 21. november 2002 endurrindað feløgum í býnum, sum nýta Ítróttarhøllina á Kambsdali til venjingar, dystir vm., 48% av leiguupphæddini í kommunalum stuðli, hetta sambært avriti av rokningum.

Mentamálanevndin hevur á fundi tann 19.mars 2012 útlutað 120.000,00 í stuðli fyri hallarleigu til feløgini, og svarar hetta til eina samlaða nýtslu upp á kr. 250.000,00, sum rindað verður høllini í leigu av feløg unum sjálvum. Parturin hjá feløgunum er sostatt 52% ella kr. 130.000,00.

Skipanin fyri leigu av fimleikarhøllini og svimjihøllini hevur verið tann síðan 1997, at hesi ikki rinda nakra leigu, hvørki fyri nýtslu av hallunum ella fyri reingerð, el- ella oljunýtslu, sum fer yvir sjálvan raksturin av skúlanum/svimjihøllini.

Áðrenn 1997 varð skipanin tann, at tímatakstur varð ásettur fyri leiguna og rokningar skrivaðar, men hetta innibar so, at mentamálanevndin veittin feløgunum upphæddirnar í beinleiðis í kommunalum stuðlum.

Nevndin varð á fundinum samd um at heita á býráðið um at galdandi stuðul upp á 48% verður avtikin, og at kommunan frá 01. januar 2013 at rokna kemur at rinda hallarleiguna hjá feløgunum beinleiðis til Ítróttarhøllina.

Sambært fyriliggjandi tølum fyri 2012 verður talan um tilsamans kr. 250.000,00. Hesi viðurskifti bera við sær, at sama skipan verður galdandi sum við útláni av fimleikarhøllini og svimjihøllini til feløgini, og at feløgini í staðin fyri beinleiðis stuðul til hallarleigu kunnu nýta Ítróttarhøllina ókeypis.

Hesi viðurskift føra við sær, at játtanin til stuðul verður lækkað við kr. 120.000,00, meðan játtanin til Ítróttarhøllina verður hækkað við kr. 250.000,00 frá 01. januar 2013 at rokna.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 10/2012.**

**Uppskot um vegleiðandi fólkaatkvøðu fyri borgarar í Fuglafjarðar kommunu.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið uppskot frá Kristinu Toftegaard Larsen, býráðslimi, dagfest 06. mars 2012, hvar heitt verður á ráðið um skjótast og helst áðrenn landsstýrið skipar fyri síni vegleiðandi fólkaatkvøðu, um at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging við hesum spurningi:

"Tekur tú undir við, at Eystur- og Fuglafjarðar kommunur verða skipaðar í eina kommunu"?

Viðmeringra til uppskotið: Tað er ein sannroynd, at kommunusamanlegging hevur staðið á dagskrá runt landið í eina tíð, og fleiri samanleggingar eru longu framdar. Hetta hevur havt við sær, at Fuglafjarðar kommuna er komin longur niður á listanum yvir størru kommunur. Ikki tí at tað skal hava alt at siga, hvussu ovarlaga á listanum kommunan liggur. Men sæð í ljósinum av, at stórmál, so sum eldraøkið og skúlaøkið fara at verða løgd út, verður tað eftir míni bestu sannføring, tær eindir, ið eru lutfalsliga størri enn hvat Fuglafjarðar kommuna er, ið koma at fáa avgerðandi leiklut, tá ið málsøkini verða løgd út.

Hon heitir á býráðið um at taka undir við uppskotinum, so borgarin fær møguleika fyri at siga sína áskoðan í hesum spurningi.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá borgarstjóranum: "Avgerðin um at hava fólkaatkvøðu um spurningin at leggja Fuglafjarðar kommunu saman við Eysturkommunu verður at útseta til eftir fólkaatkvøðuna 03. mai 2012, ið Innlendismálaráðið skipan fyri".

Broytingaruppskotið varð samtykt. 7 atkv. fyri og 2 atkv. vórðu blanklar. Blankt atkvøddu Kristina Toftegaard Larsen og Magnus Midjord.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.10.

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus S. Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen